# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Gongd á pensiónsmálið?

Nú tykist enn einaferð, sum gongd er við at koma á pensiónsmálið. Pensiónsmálið er eitt hitt størsta politiska málið yvirhøvur, og stór misnøgd hevur verið millum manna um, at als einki er hent í hesum máli í langa tíð. Fólkapensiónin, sum kom í 1959 var størsta sosialpolitiska frambrot í Føroya søgu. Farið varð burtur frá mannminkandi ellisrentuni og til eina skipan, har fólkapensjon var ein mannarættur. Sum árini eru farin er fólkapensjónin tó vorðin innanholað, og fáur man í dag kunna liva eitt sømiligt lív bert við hesi pensión, hóast Samhaldsfasti gevur eitt ískoyti.

Pensiónsmálið hevur leingi verið politisk kastibløka. Orsøkirnar tykjast vera tann stútt vaksandi skarin av eldri borgarum, sum fara at tyngja landskassan alt meira, um ikki onkur hyggjuráðini verða funnin. Tað er longu fleiri ár síðan, at breið politisk semja tóktist vera um, at ein framtíðar pensiónsskipan skuldi standa á trimum beinum: ein alment fíggjaður partur, ein arbeiðsmarknaðarfíggjaður partur og ein persónlig uppsparing.

Nú er so langt um leingi tíbetur komin á málið, og skitsa til skipan er løgd fyri almenningin. Myndilin tykist vera á leið hin sami, sum tosað hevur verið um nú í mong ár. Fólkapensjónin skal saman við Samhaldsfasta framvegis vera álitið í nýggjari pensjónsskipan. Høvuðsendamálið við eini nýggjari pensjónsskipan er at fyribyrgja fátækdømi millum pensjonistar. Pensjónistar, sum ikki hava egna uppsparing, skulu verða tryggjaðir eina fólkapensjón, sum saman við samhaldsfasta er at liva av. Mælt verður sostatt til eina skipan í trimum pørtum. Nýggja pensjónsskipanin skal tryggja, at ráð eru til, at øll kunnu fáa eina pensjón. Fyrsti parturin er fólkapensjónin, sum skal verða skattafíggjað, annar parturin er uppsparingin, sum antin er persónlig ella arbeiðsgevarafíggjað. Triði parturin er ein persónlig uppsparing, sum hvør einstakur kann leggja til rættis.

Mælt verður til at broyta verandi skipan soleiðis, at grundarupphædd og viðbót verða lagdar saman til eina fólkapensjón, har samstundis skal bera til at mótrokna aðra inntøku í allari fólkapensjónini. Soleiðis fara múgvandi pensjónistar at fáa minni í fólkapensjón. Hetta fer ivaleyst at elva til andstøðu, men ásannast má, at hetta ikki er annað enn rætt og rímuligt. Útgjaldið úr Samhaldsfasta skal ikki broytast, og verður veitt øllum pensjónistum. Hetta er eisini skilagott, men her manglar eitt ítøkiligt boð uppá ein arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn, sum veruliga livir upp til sítt upprunaliga endamál. Veðrur ikki gjørt nakað munagott, er og verður Samhaldsfasti ein viðfáningur, og tað er spell tí sjálvt hugsjónarliga støðið undir Samhaldsfasta er sera gott og eindømi um okkara leiðir. Uppskotið fevnir um onnur meira praktisk og ítøkilig viðurskifti, sum vendast kann aftur til. Samantikið kann uttan víðari ásannast, at uppskotið kemur til almenna umrøðu í tøkum tíma, og bert tíðin vil vísa, hvørt her verður egg ella ungi.

**Sosialurin**

# Fíggjarmálaráðið avsannar søguna í Degi & Viku týskvøldið 9. juni 2009

**TÍÐINDASKRIV**
*Fíggjarmálaráðið*

Fíggjarmálaráðið avsannar staðiliga søguna í Degi & Viku í gjárkvøldið um, at ein rossahandil er inngingin millum landsstýrismannin í fíggjarmálum og limir í Tvøroyrar býráð.

At dagbøturnar, sum vórðu álagdar ávísum býráðslimum, eru sleptar, er einans eitt úrslit av, at Tvøroyrar býráð nú hevur broytt roknskapirnar fyri 2007 og 2008 sambært roknskaparkrøvunum í Kommunustýrislógini.

Søgan í Degi & Viku um, at ein rossahandil er inngingin, er tí íspunnin. Á fundinum millum landsstýrismannin í fíggjarmálum og Tvøroyar býráð 9. mei varð spurningurin um roknskapirnar viðgjørdur. Men á sama fundi varð sjálvsagt eisini fíggjarstøðan hjá kommuni viðgjørd, nú inntøkurnar hjá kommununi eru minkaðar, og spurningurin um, hvussu kommunan ætlar at røkka ásetingini um, at lániskuldin ikki skal vera oman fyri eina álíkning.

Men her er talan um tvinnandi mál, sum Svf av ein ella aðrari orsøk royndi at tvinna saman.

# Dagur og vika 9. juni 2009



**KRISTIN MICHELSEN**
borgarstjóri

Viðvíkjandi tíðindasendingini í Degi & viku týskvøldið 9. juni vil eg koma við nøkrum viðmerkingum til tað, tíðindakvinnan hjá Kringvarp Føroya bar fram um undirritaða í samband við ætlaðu uppsagnirnar hjá Tvøroyrar kommunu.

Tíðindakvinnan sigur orðarætt, at »vit noyðast norður aftur til Havnar uttan at tosa við borgarstjóran Kristin Michelsen, tí hann noktar at gera samrøðu við sjónvarpið«. Hetta er beinleiðis ósatt, tí ogur bæði tosaðu saman í telefon í fleiri minuttir sama dagin.

Tíðindakvinna ringir til mín 9. juni fyrrapart og spyr, um hon kann tosa við meg. Eg sigi henni, at tað er ógvuliga nógv at gera, men biði hana ringja til mín aftur kl. 11.30. Tað ger tíðindakvinnan, men tá fái eg ikki tikið telefonina, tí eg siti á fundi og skal eisini á fleiri fundir gjøgnum dagin, og gevi mótøkuni boð um, at jeg verði upptikin allan dagin. Sostatt fær tíðindakvinnan ikki samband við meg. Tíðindakvinnan møtir so upp í móttøkuni og sigur við kvinnuna í mótøkuni hjá Tvøroyrar kommunu, at hon skal heilsa mær og siga, at hon fór at siga í innslagnum í Degi & Viku um kvøldið, at eg rann undan teimum. Hetta verði eg kunnaður um. Nú eri jeg ikki tann persónurin, ið er vanur at renna undan nøkrum, tí ringi eg til tíðindakvinnuna. Hon spyr, um jeg vil tosa við hana. Eg sigi, at ogur kunnu tosa í telefon. Tað hevði hon ongan hug til, men sigur so ok, so má eg finna spurningarnar fram. Tá ogur eru liðug at tosa í telefon, og eg havi svarað upp á hennara spurningar, sigi jeg, at hetta, sum jeg havi sagt, er tað Tvøroyrar býráð hevur samtykt. Hon svarar, at eg skal ikki rokna við, at nógv av tí ogur høvdu tosað um kom í sendingina í kvøld, tí eg vildi ikki koma á skíggjan. Hetta er sannleikin og ikki tað tíðindakvinnan ber fram í Degi & Viku at borgarstjórin noktar at gera samrøðu.

Somuleiðis vil jeg staðiliga afturvísa tað, ið var sagt í Degi & Viku 9. juni, at ein rossahandil var inngingin millum fíggjarmálaráharran og limir í Tvøroyrar býráð tann 9. mei 2009.

*Tvøroyri, tann 11. juni 2009*

# Fyrispurningur til Høgna Hoydal løgtings- og fólkatingsmann



**THOMAS J. ASKHAM**

Eg eri náddur tann aldurin, sum nøkur nevna tað gráa gullið, onnur nevna tað umvælingaraldurin (reparatiónsaldurin), tá er tað, at fyribrigdi sum at gloyma koma fyri, ella tað kann bila við minninum.

Eg sat við hús og lýddi á endaorðaskiftið á fólkatingi. Millum annað var orðaskifti um, um dómarar skuldu bera religiøs frámerki so sum muslimar turriklæði, ella aðrir religiøsir bólkar síni frámerki.

Vildi tú sett títt innlegg í blaðið, sum tú hevði á donskum?

Um eg nú skuldi havt trupulleikar við minni mínum, so sjálvandi rættar tú meg: Eg minnist at tit tjóðveldisvalevni førdu fram, at tit einans fóru niður at luttaka í orðaskiftum um føroysk viðurskifti. Tit vildu ikki leggja tykkum út í danskan politikk, og tit vildu heldur ikki vera partur av nøkrum donskum flokki, minnist meg rætt.

Høgni, tað var ilt at fáa eyga á nakað serføroyskt í hesum orðaskiftinum og í hesum málinum.

Var hetta títt persónliga íkast til eitt orðaskifti um ein minniluta í danska ríkinum?

Var hetta tín persónligi stuðul til vinstravongin í donskum politikki?

Tosaði tú vegna okkum føroyingar á fólkatingi?

Ella var hetta tann nýggja leiðin hjá tjóðveldi í donskum politikki?

*Hósvík 9. juni 2009*

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Eilen Anthoniussen eilen@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Harald í Kálvalíð harald@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.